# HOFF STOFF



Allatíðina komu fleiri fólk til, og hóast veðrið ikki var av tí besta, so má sigast, at nógv fólk var samankomið at taka ímóti



Brandur Enni sang tjóðsangin



Tá Mary og krúnprinsurin fóru inn í Tinganes, fóru fólk at klappa og rópa, og enn einaferð vísti Mary seg sum eina fólksins prinsessu, tá hon smílandi vendi sær og veittraði aftur



Krúnprinsessan og drotningin fingu hvør sítt blómutyssi handað. Abbadóttir løgmann, Anita Hermansdóttir Eidesgaard handaði drotningini tyssið, meðan dóttir Bárð Nielsen, Bjørg Bárðadóttir Nielsen handaði Mary blómur



Drotningin fekk eisini eina heilsan frá føroyska summarveðrinum, sum ætlaði sær av stað við royala hattinum. Hon var tó kvik at fáa fatur í hann aftur, áðrenn hann feyk ov langt